


*Sanna f. Niclassen og Herluf Lützen vóru sera trúføst*



*Maria Mikkelsen var eisini heima og ferðaðist og kom inn á gólvið*

**24. Maj**

Johs havde et lille Dameselskab for Marie Mikkelsen. Om Eftermiddagen havde jeg besøg af Dus, Margrethe Effersøe og Sannegrethe Kjælnes. Om eftermiddagen havde jeg Besøg af Missionær Brend. Vi spillede et Parti Skak sammen, og jeg vandt.

## Brend

Tað tykist, sum at Arthur Brend hevur havt ein serligan týdning fyri Egil, sum hetta kom til sjóndar í greinini hjá Egili í blaðnum Naade og Sandhed.

Arthur Brend var breti, sum kom til Føroyar at hjálpa gamla Sloan, sum var trúboðari um aldamóti. Brend var tannlækni, og hetta nýtti hann eisini í trúboðaravirkinum. Í 1915 fór hann saman við Daniel J. Danielsen, serliga kendur fyri sítt virksemi í Congo, at geva blaðið Naade og Sandhed út. Danielsen doyði í 1916, so nú var Brend einsamallur um blaðið. Hetta var eitt framkomið blað við nógvum myndum Tá ið hann nú vitjar inn á gólvið, man tað vera sum sálarhirði.

Tann 19. mai var eisini nógv vitjan, m.a. av "fru Petersen" fra Klaksvig. Hetta er helst mamma Thorstein Petersen, seinni kendur bankastjóri og politikkari.

**24. Maj**

Johs havde et lille Dameselskab for Marie Mikkelsen. Om Eftermiddagen havde jeg Besøg af Dus, Margrethe Effersøe og Sannegrethe Kjelnæs.

Brend er aftur inni á gólvinum. Teir plagdu eisini at telva saman.

## Maria Mikkelsen

Maria Mikkelsen var ein kendur føroyingur í Keypmannahavn. Hon var ættað úr Dalólastovu í Havn og var fødd í 1877. Hon fór 21 ára gomul til Danmarkar, har hon gjørdist sera virkin í felagslívinum. Hon var ein samskipari fyri føroyskar útisetar, og hon gjørdi nógv fyri føroyska bókaútgávu. Hon skrivaði og yrkti eisini sjálv. Maria kom aftur til Føroyar í 1947 og doyði í 1956.

Hon man hava verið í Føroyum og ferðast. Hon kann væl hava kent Johs frá hansara tíð niðri, og nú vitjar hon eisini Egil.

**28. maj**

Da det var fru Lavus Jacobsens Fødselsdag, sendte jeg hende et Kort. Var oppe til Klokken fire. Dog følte jeg mig lidt sløj, men befandt mig godt, da jeg var kommet i Seng igen. Om Eftermiddagen laa jeg og læste Aargange af Naade og Sandhed.

Nú mátti han sova við bandaguni, og tað var alt annað enn stuttligt.

**16. Juni**

Vitjan av Onnu og Ketty Sloan, døtur Gamla Sloan

## Faktorurin doyr

**17. Juni**

Var oppe som sædvanligt, dog følte jeg mig meget sløj. Da Abbi var overmaade sløj hele Dagen, var jeg nede for at se til ham, inden jeg gik i Seng. Jeg talte lidt med ham, og han sagde, at han kjendte mig, hvilket jeg sikkert tror, at han gjorde. Jeg læste da disse Ord op for ham, som staar i Paulus 2. Brev til Corint 5te kapitel: "Thi vi ved (altsaa de som tror) at om vort Legemes jordiske Hus nedbrydes, saa har vi en Bygning af Gud, et Hus som ikke er gjort med Hænder, evigt i Himlene." Jeg tror sikkert, at han hørte paa mig, thi han laa og saa paa mig hele Tiden med klare og udmattede Øjne. Hen paa Eftermiddagen tog hans Kræfter mere og mere af, og ved Kl 10 Tiden sovnede han stille og roligt. Lige forinden havde han haft megen Aandenød, ligesom han vilde kvæles. Min Bøn til Herren var, at min kære gamle Abbi, som altid har været som en Fader for mig, maatte tages hjem til Herren, da hans Time var kommet, og mit Haab er, at han nu er, hvor vort blivende Sted er (altsaa de som tror paa den Herre Jesus). Intet er umuligt for Herren. Guds Fred hvile over hans Minde. Det er mit Haab, at min Herre og Frelser har hørt min Bøn.

**Juni**

Sov ikke hele Natten. Stærk hovedpine m.m. Havde Besøg af fru Olivia Andreassen.

("Hon er eitt ólukkudýr, stakkalin.") Jeg synes virkelig, at det er ("so synd í henni.") Om Aftenen havde jeg ligeledes meget svært ved at falde i søvn.

## Nýtt um Oliviu

Júst hetta vísir eitt dámligt eyðkenni hjá Egil. Hóast hann sjálvur er sera illa fyri, ikki minst hendan dagin, so hevur hann samkenslu við onnur, hóast tey langt frá eru so illa likamliga fyri sum hann.

Men tað serliga áhugaverda er, at her er talan um konu Pola í Dali. Tað er eisini áhugavert at "hitta" Oliviu Andreassen inni hjá Egili. Hon hevur nevniliga eisini samband við tey á Krákusteini, tí maður hennara Napoleon var hálvbeiggi Charlottu, mammu Søren.

Maður Oliviu, Napoleon, f. 1868, er ein tann fremsti framburðsmaður í Føroyum í teirri tíðini.

Hann fór 14 ára gamal sum skipsdrongur við Frederiksvaag hjá gamla Restorff. Hann fór so víðari út í heim at sigla millum annað til Amerika. Tá varð hann umvendur, og heimkomin varð hann ein av teimum fremstu viðhaldsmonnunum hjá gamla Sloan.

Hann fór til Danmarkar at lesa til stýrimann og hitti her Oliviu, sum hann giftist við.

Poli vildi royna nýggjar leiðir í fiskiskapi. Hann fór at sigla við fiski til Hollands fyri at fáa betri prís. Í 1906 var hann á odda fyri eini rannsóknarferð til Grønlands, sum nógv er skrivað um. Hansara leiklutur verður framvegis kannaður í Grønlandi. Hann stóð eisini fyri helst fyrstu trolroyndini undir Føroyum.

Poli var eisini ein teirra, sum stovnaði mjólkaforsýningina í 1908. Hann keypti skip, sum hann kallaði upp eftir konuni, Olivia, og við tí gekk hann burtur í 1912.

Sum ofta er, táið maðurin doyr, frættist einki frá konuni, men nú er hon so og vitjar Egil.

Í 1919 fer hon til Danmarkar við børnunum, og nakað seinni flytir hon við flestu teirra so langt burtur sum til New Zealand. Tað sigst, at onkur sonur var farin frammanundan og bað so mammu sína koma.

Men tað sæst greitt í hesi orðing í dagbókini, at Olivia hevur ikki havt tað gott sálarliga. Tað vóru liðin seks ár, síðan maðurin doyði. Kanska hevur hon kent seg fremmanda sum donsk í Føroyum.

**Den 21. Juni**

Hendan dagin fer abbin til gravar. Begravelsen foregik kl. 1. Pastor Nielsen talte. Jeg var overmaade træt "líka sum brotin sundur í fleiri pettir" altsaa dødtræt, mørbanket, som Danskerne siger. "Fólk rann uppi hjá mær í heilum."

Rikka hjá Ludda var inde hos mig, mens Johs og Faster fulgte Abba hjem til hans sidste Hvilested.

Om Aftenen var jeg ligeledes dødtræt og kunde ikke paa nogen maade falde i søvn. Efter Aftensmad var Faster og Johs atter ude ved Graven. "Tað var Ove og Ediths brúdleypsdagur."

**22. Juni**

Følte mig atter meget sløj, ligesom dødtræt. Havde intet sovet hele Natten. Morgentemperaturen var fem Streger for høj. Laa og læste Detektivromaner hele Dagen igennem. Da jeg hen paa Eftermiddagen fik en slem Hovedpine, tog jeg ½ pulver Asperin, hvilket straks hjalp.

**Den 1. Oktober**

N.B. (Har ikke kundet føre Dagbog i tre Maaneder og sytten Dage paa Grund af Sygdom. I al den Tid har jeg ligget fuldstændig uden Bevidstheden). Skrev et Kort til Sanna Niclasen. Befandt mig nogenlunde godt hele Dagen igennem.



*Hjalmar Herup var ein framúr lækni*

**2. Oktober**

Havde lægebesøg af Fysikus Heerup. Han lod til fuldstændigt at hava glemt, hvad han saa pænt lovede den foregaaende Dag. Men der er nu ikke noget at sige til. Andet kan man ikke vente af en dansk Læge. Det danske Blod lader sig ikke fornægte lige saa lidt som at stave "Jeg." Sligt skader jo blot.

Tann 3. skrivar hann eisini, at hann sum so hevur tað gott, men at lagið er ringt.

Tann 4. kemur Anna við Hús við mjólkabátinum. Hon skal vera í Havn í einar 3 mánaðir. Anna var systir Jógvan Húsgarð, og hon giftist við skiparan Jóan Magnus Thomsen. Tey vóru grannar í Syðrugøtu, so tað var ikki so løgið, at tey hittust.

**6. Oktober**

Det var Konfirmationssøndag. Kitty Andreassen blev Konfirmeret. Hun var hernede et lille Øjeblik lige efter Kirke. Om Eftermiddagen havde jeg først besøg af Sanna og Poul Kjælnes, siden Just Jacobsen og Herluf Lützen.

## Føddur "baptistur" konfirmeraður

Kitty Andreassen var dóttir Oliviu og Pola í Dali. Tí er henda konfirmatiónin so áhugaverd. Poli var í fremstu røð í Brøðrasamkomuni. Hansara børn eru tí neyvan doypt sum børn. Tó var Poli á hesum øki sera tolerantur. Hann var nevniliga í barsil, tá ið Georg L. Samuelsen, kendur frá Dimmalætting, varð doyptur sum barn í 1911.

Eftir øllum at døma hevur Olivia ikki drigið somu línu sum maðurin, tá ið hon letur børnini konfirmera, eftir at hann er deyður. Hetta kunnu tey ikki hava verið blivin, uttan at vera doypt í kirkju frammanundan.

Harvið kann hon hava sett seg uttan fyri tann

➡